# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Í nítiárunum hugsaði eg fleiri ferðir um at melda meg sjálvan, men eg stúrdi fyri lívinum*

*Radovan Karadzic*

# Karadzic: Eg fekk lyfti um grið

**Radovan Karadzic heldur uppá, at hann fekk lyfti um at sleppa undan rættarsókn aftan á borgara-skríggið í Bosnia**

Radovan Karadzic sigur, at tað var sendimaðurin Richard Holbrooke, sum gav sær lyfti um grið aftan á borgarakríggið í Bosnia. Sambært lyftinum skuldi Karadzic sleppa undan at verða drigin fyri rættin fyri krígsbrotsverkini í Bosnia, treytað av, at hann helt seg burtur frá tí almenna pallinum aftan á borgarakríggið.

Richard Holbrooke, sum er amerikanari, vísir orðunum hjá fyrrverandi bosniaserbiska leiðaranum aftur. Holbrooke var amerikanskur sendimaður á Balkan í 1998.

Altjóða krígsbrotsmannad ómstólurin í Haag ákærdi í gjár Radovan Karadzic fyri 11 ymisk brot á altjóða lógir og reglur. Karadzic vildi ikki siga, hvørt hann játtar seg sekan ella ikki, men bað um tíð til at kanna ákærurnar nærri. Sambært reglunum mhjá dómstólinum kann tann ákærdi fáa 30 dagar til at umhugsa seg í.



*Richard Holbrooke*
*Mynd: Polfoto*

# Kina táttar takið um Tibet undan summarleikunum

Kina hevur sett fleiri løgreglufólk og hermenn at tryggja frið í Tibet, nú teir olympisku summarleikirnir nærkast

Tað almenna dagblaðið í Tibet skrivar, at endamálið við at lata fleiri løgreglufólk og hermenn hava eftirlit við viðurskiftunum í Tibet, er at tryggja tað, sum blaðið kallar "fullkomna trygd".

Kinesisku myndugleikunum er greitt, at altjóða samfelagið fer serliga at varpa ljós á mannarættindini í Kina, nú teir olympisku summarleikirnir verða í Beijing. Í mars bardu myndugleikarnir fleiri mótmælisgongur í Tibet niður við harðari hond, og síðani hava løgreglan og herurin hildið Tibet í einum jarnneva.

Tað ætla teir kinesisku myndugleikarnir framvegis at gera, og undir sjálvum leikunum fara teir uttan iva at tátta takið um Tibet. Man narættindafelagsskapir siga, at stjórnin í Beijing ber ótta fyri ófriði í Tibet, og at sjálvt tann minsti ófriðurin kann vera sera óheppin fyri kinesisku stjórnina.

Í einum innanhýsis arbeiðsskjali, sum Reuters hevur fingið hendur á, stendur milluum annað, at kinesisku myndugleikarnir skulu í hernað ímóti "øllum harðskapi og tí, ið minnir um yvirgang".



*Kinesisku myndugleikarnir fóru harðliga fram, tá munkar í Tibet gjørdu uppreristur í vár*
*Mynd: Polfoto*



# Risastórur ísflaki loysnaður

Ein ísflaki, sum er einar 20 ferkilometrar til støddar, er loysnaður frá ísinum við ta norðurkanadisku strondina. Fylgisveinamyndir, sum CNN hevur víst, vísa, at ísflakin loysnaði frá strondinmi á Ellis Island. Kanadiskir granskarar halda, at hetta er tann største ísflakin, sum er loysnaður har á leiðini síðani 2005, tá ein 60 ferkilometrar stórur ísflaki brotnaði av ísinum nærhendis Ayles. Ellis island var einaferð í tíðini knýtt at kanadisku strondini við einum jøkli, sum var einar 10.000 ferkilometrar, siga teir kanadisku granskararnir við CNN.

## STUTT SAGT

### Skal í fongsul

Potjaman Shinawatra, kona fyrrverandi teilendska forsætisráðharran Thaksin Shinawatra, er dømd trý ára fongsul fyri skattasvik. Ein beiggi hennara og ein skrivari hennara vórðu eisini dømd sek í skattasviki og fingu fongsulsrevsing ímillum tvey og trý ár. BBC skrivar, at Potjaman Shinawatra gjørdist frá sær sjálvari, tá dómarin las dóminn fyri henni. Dómarin nýtti samstundis høvi til at minna fyrrverandi forsætisráðharrafrúnna á, at sum kona forsætisráðharran átti hon at vera ein góð fyrimynd fyri onnmur í landinum. Men tað hevði hon ikki verið.

Maðurin, Thaksin Shinawatra, hevur alla tíðina avsannað, at hann, konan ella nakar í familjuni hava brotið skattalógina ella aðrar lógir. Hann bleiv koyrdur frá fyri tveimum árum síðani og skuldsettur fyri at hava oyðslað almennar pengar burtur.



*Potjaman Shinawarta skal í fongsul*
*Mynd: AP*

### Olmert frá

Tá formansval verður í ísraerlska stjórnarflokkinum Kadima tann 17. novembur, verður núverandi formaðurin, Ehud Olmert, forsætisráðharri, ikki millum valevnini til formansvalið. Ein talsmaður hjá Olmert segði við blaðið Haaretz í gjár, at forsætisráðharrin hevur valt at brúka ein størri part av síni tíð upp á at fáa frið í lag við palestinar. Egyptiskir politikarar hava svarað, at eftir teirra tykki er tað líka mikið, um Ehud Olmert er við í samráðíngunum ella ikki. Ehud Olmert fer tó ikki úr formansstarvinum, fyrr enn eftirmaður hansara hevur skipað stjórn, og í Ísrael kann tað lættliga taka fleiri mánaðir.



*Ehud Olmert fer frá sumfloksformaður*
*Mynd: Polfoto*